ítróttur

Nr. 239 • týsdagur • 13. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Enn er gongd á samráðingunum

**Um góða viku fara ÍSF og Kringvarpið aftur at fundast um rættindini at varpa frá føroyskum ítróttarhendingum. Sum skilst, so eru eingi serlig framstig hend enn, men samráðingarleiðarin hjá ÍSF, John Kjær, er positivt innstillaður**

ÍTRÓTTARÆTTINDI
*Jákup Mørk*



*Samráðingarleiðarin hjá ÍSF vil ikki siga tað allar minsta um samráðingargongdina. Ikki annað enn, at hann heldur tað vera positivt, at partarnir enn sita við borðið*

Tað eru nú tríggir mánaðir síðani, at sáttmálatrætan millum Kringvarpið og ÍSF av álvara kom fram í ljósmála. Ein træta, sum fyrst og fremst snýr seg um, at Kringvarpið hevur noktað fyri at nýta tey lýsaranøvn, sum ávísar ítróttagreinar hava knýtt at sínum kappingum. Eitt nú soleiðis sum Hond- og Fótbóltssambandið hava gjørt.

Og tað hevur serstakliga verið Fótbóltssambandið, sum hevur sett seg upp ímóti avgerðini hjá Kringvarpinum. Ella kanska rættari, redaktiónunum á Út- og Sjónvarpinum. Snøgt sagt, so hevur FSF noktað at ganga undir eina kollektiva avtalu, har einkarættur at varpa verður latin Kringvarpinum. Og har Kringvarpið framhaldandi heldur fast um sama politikkin við ikki at nevna lýsaranøvn sum t.d. Formula-deildin.

Hinvegin hava vit skilt, at Hondbóltssambandið hevur latið ÍSF fulltrú at samráðast, uttan at treyta sær, at sponsor-nøvnini verða nevnd.

### Onga viðmerking

Tað eru nú nakrar vikur, síðani seinasta fundurin var í málinum, men hetta merkir ikki, at samráðingarnar eru steðgaðar upp.

- Tað er komið nakað í drag, tí fólk upp á skift hava verið burturstødd. Men nú eru vit øll at kalla samlað aftur, og stutt undan jólum verður so næsti fundurin, sigur John Kjær, sum vegna ÍSF er samráðingarleiðari.

John er púra kúrrur, tá spurt verður um, hvørt nakað glið yvir høvur er komið á samráðingarnar.

- Vit hava avtalað, at so leingi sum samráðst verður, so hava vit ongar viðmerkingar, er einasta svarið, sum verður givið um hetta.

Men sum vit á blaðnum hava skilt, so er støðan hjá pørtunum báðum ikki vikað stórvegis. Og eitt nú hava feløgini innan FSF lagt upp til, at talan verður um ein sáttmála, har Kringvarpið ikki fær einkarrætt, og har treytað verður, at sponsor-nøvn verða nýtt.

Samstundis hevur Kringvarpið staðfest, at avgerðirnar hjá redaktiónunum enn standa við makt.

Spurdur um hetta ikki í veruleikanum merkir, at tað er ógvuliga lítið at samráðast um, hevur John Kjær framvegis somu støðu.

- Vit gera ikki viðmerkingar.

*Men hava tit nakað at samráðast um?*

- Tað er væl tí, at vit enn sita við borðið. Og tað í sjálvum sær er væl saktans positivt, sigur hann.

Sáttmálin, sum ÍSF hevur við Kringvarpið, gongur út á nýggjárinum. Avtalað er tó millum partarnar, at so leingi sum gongd er á samráðingunum, stendur gamli sáttmálin við.

## Pele sær Ongland sum størstu hóttanina

- Antin Ongland, Italia ella Brasilia koma heilt til finaluna, men um eg skal útnevna ein vinnara longu nú, so verður tað Brasilia, sigur Pele, eftir at lutakastið til bólkaspælið var avgreitt fríggjadagin.

Pele sjálvur vann HM-heitið tríggjar ferðir - í 1958, 1962 og 1970. Og hann ivast ikki í, hvør eigur heimsins besta lið í løtuni.

- Brasilia er besta liðið í hesi stund, tí teir eru tað einasta liðið, ið hevur tveir góðar leikarar til hvørt einasta pláss á vøllinum. Einasti trupulleikin hjá venjaranum er at velja, hvør skal byrja inni, slær Pele fast.

Hann metir tó, at Ongland og Italia eru vandamiklastu hóttanirnar hjá Brasilia.

- Ongland hevur heilt avgjørt ein góðan møguleika at koma í finaluna. Eg havi sæð so at siga hvønn einasta dyst hjá teimum seinastu tvey árinni, og teir hava tikið seg nógv fram, heldur Pele, sum tó eisini gevur Italia ein góðan møguleika at gera seg galdandi, um mett verður út frá tveimum teimum seinastu árunum.

Eingin ivi er um, at Brasilia hevur ein heilt ótrúligan hóp av leikarum í løtuni. Serliga tær offensivu kreftirnar eru øgiligar. Við Ronaldo, Kaka, Adriano og Robinho verður torført at halda álopsspælinum í teymum.

**-SíS**

## Tottenham nærkast oddinum

Við sigri á Portsmouth hevur Tottenham nú otað seg upp á fjórða plássið

Dysturin millum Tottenham og Portsmouth mánakvøldið endaði við 3-1 sigri til Spurs. Tað var tó Portsmouth, ið legði seg á odda við máli frá Lomano Tresor Lua Lua, og Portsmouth var eisini frammanfyri í steðginum.

Eftir steðgin var tað tó Tottenham, ið setti seg á dystin, og liðformaðurin Ledley King javnaði fyri heimaliðið, tá ið ein tími varð farin.

Tottenham fekk ikki sigursmálið fyrr enn fimm minuttir fyri leiklok, og tað var egyptarin Mido, ið skoraði frá brotssparksblettinum. Løtu seinni sló Jermain Defoe sigurin fastan við máli til 3-1.

Tottenham hevur havt eitt gott kappingarár, og teir liggja nú á fjórða plássinum bara eitt stig aftanfyri Liverpool og Manchester United.

**-SíS**

## Komandi vikurnar avgerandi hjá Raul

Komandi vikurnar fara at staðfesta, hvussu álvarsligur skaðin hjá Real Madrid spælaranum er

Læknarnir hjá Real Madrid hava hugt nærri at knænum hjá áleyparanum, og vónin er, at teir ikki verða noyddir at leggja Raul undir skurð fyri skaðan, sum hann fekk fyri trimum vikum síðani.

- Alt gongur væl í løtuni, men næstu vikurnar verða avgerandi. Hvat og hvussu ber illa til at siga, fyrr enn eg fari av høkjunum í næstum.

Spania er í HM-kappingina í bólki H saman við Tunis, Ukraina og Saudi Arabia.

**-mørk**